LM-072/2025

FYLGISKJAL 10

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

23. oktober 2025

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (berarakanning)

Landssjúkrahúsið sendir við hesum okkara viðmerkingar til lógaruppskotið.

Viðmerkingarnar eru til viðmerkingarnar undir *punkt 1.3. Endamálið við uppskotinum*.

Landssjúkrahúsið ynskir, at tað verður gjørd ein áseting um, at tað verður kravt at ein lækni ger eina ávísing til berarakanningina í Sjúkrahúsverkinum, hetta fyri at tryggja, at tað eru røttu persónar, sum fáa boðið kanningina, og fyri at tryggja, at røttu kanningarnar verða bílagdar.

Í viðmerkingunum er nevnt, at blóðroyndin verður tikin og viðgjørd í Føroyum. Hetta kann hava við sær, at føroyingar, sum eru uttanlands í lestrarørindum, ikki fáa tilboðið um berarascreening fyri ílegusjúkur. Hetta kann vera óheppið fyri nógvar føroyingar, eftirsum fleiri fáa børn við føroyingum í tíðarskeiðnum, meðan tey eru uttanlands í lestrarørindum.

Landssjúkrahúsið metir, at tað er óheppið, at tað í viðmerkingum til lógina verður ásett, at blóðroyndin skal viðgerast í Føroyum. Hetta kann hava ávirkan á kostnaðarstøðið og/ella góðskustøðið, og meta vit, at tað eigur at vera upp til Sjúkrahúsverkið at avgera, hvussu tað er skynsamast at viðgera kanningarnar.

Vinarliga

Tummas í Garði
Varastjóri